# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 22.06.2015*

**Bygdaráðsfundur 22.06.2015 kl. 16.00 til kl. 19.40**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | burturstødd |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 33/2015 Fíggjarmál**

J.nr.00.32.10-S08-2-15

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av eykajáttan til Skálafjarðarsamstarvið.

Fyrsta viðgerð var á Bygdaráðsfundi 18.05.2015.

Fyribils fíggjarlig uppgerð pr. 31.03.2015 og framrokning fyri 2015 er komin frá Skálafjarðarsamstarvinum.

Framrokningin staðfestir, at grundað á minni inntøkur og nakað fleiri útreiðslur, koma at mangla 3 mió kr. í til raksturin fyri 2015 í mun til løgdu fíggjarætlan fyri 2015. Herav er parturin hjá Nes kommunu kr. 600.000.

**Tilmæli**

Á fundi 13.05.2015 mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 600.000 til Skálafjarðasamstarvið, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Avgerð**

Á fundi 18.06.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av at játta kr. 600.000 til Skálafjarðasamstarvið, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 22.06.2015*

**Mál nr. 34/2015 Fíggjarmál**
J.nr. 08.14.00-Ø09-1-15
**Málslýsing**
Hin 28.05.2015 kom roknskapurin fyri 2014 hjá Kongshavnar havn til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 18.06. 2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum soleiðis sum hann er uppsettur.

Súni í Hjøllum, formaður í Kongshavnar Havn, var úti meðan málið var viðgjørt

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum, formaður Kongshavnar Havn, var úti meðan málið var viðgjørt

**Mál nr. 35/2015 Fíggjarmál**
J.nr.2015-0046-0077
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av meirkostnaðinum til omankoyringin til bátahylin og asfaltering av P-øki.

Fyrsta viðgerð, av meirkostnaðinum til omankoyringina til bátahylin og asfaltering av P-øki, var á eyka bygdaráðsfundi 11.04.2015.

Í sambandi við arbeiðið av at leggja nýggjar leiðingar, vegagerð og asfaltering v.m. omanfyri bátahylin í Oyrunum, heldur Tekniska nevnd, at omankoyringin og P-økið eisini eigur at verða dagført.

Tekniski leiðarin hevur, 10.04.2015, dagført kostnaðarmetingina av íløguni av samlaðu vegagerðini v.m. omanfyri bátahylin í Oyrahavnini, og er samlaði kostnaðurin nú mettur til kr. 1.443.470,00.

Kostnaðarmetingin frá 07.04.2015 var áljóðandi kr. 1.294.200,00. Sostatt ein mettur meirkostnaður uppá kr. 149.270. Á bygdaráðsfundinum 23.03.2015 játtaði bygdaráðið kr. 809.000 til íløguna.

Tekniski leiðarin hevur eisini innheintað tilboð uppá asfaltering av øllum økinum, frá EM Asfalt og HJ Asfalt.

**Tilmæli**
Bygdaráðið mælir til, at taka av tilboðnum frá EM.Asfalt.

Í sambandi við asfalteringina og meirkostnaðin mælir bygdaráðið til at játta kr. 634.470 afturat til vegagerð v.m. omanfyri bátahylin. Peningurin verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur.

**Avgerð**
Bygdaráðið samtykt einmælt at taka av tilboðnum frá EM Asfalt, og at meirkostnaðurin kr. 634.470 verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur.

**Tilmæli**
Á fundi 18.06.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av meirkostnaðinum av vegagerð v.m omanfyri bátahylin, og at peningurin kr. 635.000 verður tikin av stovninum vegir íløga.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**<u>Mál nr. 36/2015 Fíggjarmál</u>**
<u>J.nr.2015-0044-0081</u>
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av meirkostnaðinum til at skifta gøtulyktir í kommununi.

Fyrsta viðgerð av meirkostnaðinum til at skifta 6 stk. lyktir, á innara parti av Heygsvegnum, var á bygdaráðsfundi 23.03.2015.

Tey elstu gøtuljósini í kommununi hava u58w armaturir, men nú fáast ikki eykalutir til hesi longur.

Tað, sum nú verður brúkt er led armatur. Hesi brúka minni orku og hava longri livitíð.

Mett verður, at Nes kommuna eigur at byrja at útskifta til led armaturir, og at byrjast kann t.d. við tí innara partinum av Heygsvegnum, har 6 lyktir eru. Kostnaðurin av hesum er kr. 30.000,00 fyri armaturir og arbeiðsløn.

**Tilmælir**
Á fundi 10.03.2015 mælir Tekniska nevnd til at skifta til led armaturir, og at byrjað verður við at skifta 6 stk. í tí innara partinum av Heygsvegnum.

Á fundi 17.03.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 18.06.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av kostnaðinum av at skifta 6 stk. lyktir, í tí innara partinum av Heygsvegnum, og at peningurin kr. 40.000 verður tikin av stovinum vegir íløga.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 37/2015 Trivnaðarmál**
J.nr.00.32.10-S08-2-15
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av eykajáttan til Barnaverndartænastuna

Í skrivi 09.06.2015 søkir Barnaverndartænastan við Skálafjørðin um eykajáttan.

Barnaverndartænastan mælir samstarvinum til at játta 2,4 mió kr. eyka til barnaverndartænastuna við Skálafjørðin. Eykajáttanin fer til at fíggja verandi virksemi, til nýtt virksemi restina av árinum og til bráfeingistørv á sosialráðgeva, so umsitingin fær hildið sínar skyldur.

Parturin hjá Nes kommunu er kr. 496.000,00, sum er 20,6% av kostnaðinum.

**Tilmæli**
Á fundi 10.06.2015 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Barnaverndartænastuni eina eykajáttan á kr. 496.000,00.

Á fundi 18.06.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

Fíggjarnevndin mælir eisini til, at bygnaðurin, viðv. Barnaverndartænastuni, verður endurskoðaður.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 38/2015 Jarðarmál**
J.nr. 01.04.00-G01-1-15
**Málslýsing**
Í skrivi 29.04.2015 sendir Búnaðarstovan umsókn, um uppískoytisstykki til matr. nr. 458, Tofta bygd, til ummælis hjá kommununi.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd frá at játta uppískoytisstykki til matr. nr.458 grundað á, at høvuðsvatnleiðing liggur oman gjøgnum stykkið, tætt uppat markinum. Nes kommuna má, til eina og hvørja tíð, hava atgongd til vatnleiðingina.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 22.06.2015*

**Mál nr. 39/2015 Havnin**
J.nr.09.08.30-P20-1-15
**Málslýsing**
Ynski er um at fáa flutt oljutangan og pumpuna í bátahylinum grundað á, at tað er so nógvur súgur, har sum bátarnir liggja og skulu bunkra.

**Tilmæli**
Á fundi 9.06.2015 mælir Tekniska nevnd til, at oljutangin verður standandi, og at slangan til áfylling verður longd soleiðis, at bátar eisini kunna taka olju innanfyri molan.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 40/2015 Byggimál**
J.nr. 02.34.02-P20-2-15
**Málslýsing**
Í skrivi 27.05.2015 søkja Helen Højgaard og Jan Joensen um graviloyvi til sethús á grundstykki teirra matr. nr. 357f.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til at játta Helen Højgard og Jan Joensen graviloyvi til sethús á matr. nr. 357f, og at Tekniska deild arbeiðir við staðseting til innkoyringina.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 42/2015 Umhvørvismál**
J.nr. 09.08.26-G01-1-15
**Málslýsing**
Í skrivi 05. juni 2015 søkir Kaj Johannesen, Æðuvík um loyvi til at taða fram við Mylluvegnum.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til at játta Kaj Johannesen loyvi til at taða eftir galdandi reglum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 43/2015 Byggimál**

J.nr.82,20,00-P20-1-15

**Málslýsing**

Í samband við ger av fíggjarætlanini fyri 2015 samtykti bygdarráðið at fara undir fyrireiking av bygging av vøggustovu á Toftum.

Byggifelagið KBH hevur bygt barnagarðin, sum stóð liðugur í 2011, og bygdarráðið hevur biðið KBH um at geva tilboð uppá arbeiðið av nýggju vøggustovuni.

Tilboðið er uppá íalt kr. 3.676.463,80 u/mvg, og er íroknað fyrireikingararbeiðið, partvís jørðarbeiði, betong- og timburarbeiði, el-arbeiði, HVS-arbeiði og málingaarbeiði.

Haraftur kemur kostnaður fyri nakað av jørðarbeiði, eftirlit, innbúgv og MVG, sum íalt verður mett at kostað kr. 1.180.000 soleiðis, at endaligi kostnaðurin fyri vøggustovuna verður mettur til kr. 4.856.463,80.

**Tilmælir**

Á fundi 19.06.2015 mælir Trivnaðarnevndin til at fara undir bygging av vøggustovu soleiðis, sum arbeiðsbólkurin mælir til, og at taka av tilboðnum frá KBH uppá kr. 3.646.463,80.

Á fundi 19.06.2015 mælir Tekniska nevnd til at fara undir bygging av vøggustovu soleiðis, sum arbeiðsbólkurin mælir til og at taka av tilboðnum frá KBH uppá kr. 3.646.463,80.

Á fundi 19.06.2015 mælir Fíggjarnevndin til fara undir bygging av vøggustovu soleiðis, sum arbeiðsbólkurin mælir til og at taka av tilboðnum frá KBH uppá kr. 3.646.463,80.

Fíggjarnevndin mælir eisini til, at samlaði kostnaðurin uppá kr. 4.856.463,80 verður fíggjaður soleiðis, at kr. 2.500.000 verður fíggjaður yvir raksturin og tikin av stovninum barnagarðurin íløga, við kr. 1.250.000 í 2015 og kr. 1.250.000 í 2016, meðan restin, kr. 2.356.463,80 verður fíggjað við lántøku.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd, Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 44/2015 Byggimál**

J.nr.82.07.00-P20-1-15

**Málslýsing**

Undan og eftir, at grasvøllurin á Svangaskarði bleiv útskiftur við graslíki í 2012, hevur Nes kommuna og Fótbóltssamband Føroya arbeitt við einari ætlan um at útbyggja ítróttar- og felagshúsið á Svangaskarði.

Ein bygginevnd umboðandi Nes kommunu og Fótbóltssamband Føroya hevur arbeitt við einari ætlan um at útbyggja verandi hús. Ætlanin umfatar 2 nýggj skiftingarúm, sum verða bygd undir

altanini norðureftir og nýggjan bygning eystureftir, sum kemur at verða nýggj inngongd til húsið. Verandi inngongd og trappuuppgongdin miðskeiðis í húsinum verður tikin burtur. Harumframt innheldur verkætlanin fleiri WC, bæði úti og inni, umframt klæðnarum, vaskirúm og goymslurúm.

Nes kommuna er eigari av húsinum, men tað verður Fótbóltsamband Føroya, sum verður byggiharri, við einum ávísum nýtslurætti til húsið.

Byggifyritøkan KBH er biðin um at koma við einum tilboðið til verkætlanina og hevur givið heildartilboð, sum er uppá kr. 4.979.000 uttan MVG. Harafturat kemur kostnaður fyri eftirlit.

Í skrivi 10.06.2015 søkir Teknistovan í Gøtu, vegna Fótbóltssamband Føroya, Gundadalur, 110 Tórshavn, um byggiloyvi til útbygging av ítróttarhúsinum á Svangaskarði.

Samráðingar hava verið við Fótbólssamband Føroya um fíggingina av útbyggingini, og Nes kommuna luttekur í fíggingini við 1,0 mió. Kr.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til at játta FSF byggiloyvið til útbyggingina av Ítróttarhúsinum á Svangaskarði, og at Nes kommuna verður við í íløguni við 1,0 mió kr, kr. 500.000 í 2015 og kr. 500.000 í 2016. Niclas Davidsen fór av fundinum áðrenn málið var viðgjørt, og Jákup A. Olsen kom á fundin fyri Niclas Davidsen.

Á fundi 18.06.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og mælir til, at peningurin verður tikin av stovninum Svangaskarð íløga.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 45/2015 Ymiskt**
J.nr.04.00.00-G01-1-15
**Málslýsing**
Ein partur av at hava góðkendan graslíkisvøll á Svangaskarði er, at nokk av gummi er á vøllinum. Í sambandi við eftirlit, í vár, bleiv mælt til at vøllurin fekk meira gummifyllu til komandi ár.

Kommunan hevur fingið tilboð frá Polytan uppá 8 tons, sum mett verður má til. Kostnaðurin fyri 8 tons er kr. 145.000,00.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til, at vøllurin fær meira gummifyllu og at tikið verður av tilboðnum frá Polytan. Niclas Davidsen fór av fundinum, áðrenn málið var viðgjørt, og Jákup A. Olsen kom á fundin fyri Niclas Davidsen.

Á fundi 18.06.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 46/2015 Byggimál**
J.nr.82.07.00-P20-2-15
**Málslýsing**
Nógvir rútar í B68 húsinum er punkteraðir. Umsjónarmaðurin hevur biðið um tilboð, uppá at skifta teir punkteraðu rútarnar, frá Atlanticpane. Tilboðið er áljóðandi kr. 23.764,00 v/mvg.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til, at rútarnir verða skiftir og at tikið verður av tilboðnum frá Atlanticepane. Niclas Davidsen fór av fundinum, áðrenn málið var viðgjørt, og Jákup A. Olsen kom á fundin fyri Niclas Davidsen.

Á fundi 18.06.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum viðlíkahald  Svangaskarð.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 47/2015 Vegamál**
J.nr. 08.03.50-P20-2-15
**Málslýsing**
Í skrivi 05.06.2015 heita tveir borgara á kommununa um at gera atkomumøguleikarnar til neyst teirra  í Krabbaurð matr. nr. 708 og 710 betri, tí teir hava tørført við at koma til neystini undir verandi umstøðum.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til at betra verður um atkomumøguleikan til neystini við, at garðurin, í sunnara horni, framman fyri neystini verður tikin burtur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 48/2015 Byggimál**
J.nr. 02.34.02-P20-3-15
Byggiloyvi til bilhús og altan

Í skrivi 03.06.2015 søkja Helena og Fróði Danielsen um byggiloyvi til bilhús og altan samb. innsendu tekningum.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til at játta byggloyvi til bilhús, men at bíðað verður við svarinum viðvíkjandi altanuni, meðan nærri kanningar verða gjørdar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 49/2015 Vegamal**
J.nr. 06.01.06.-P20-1-15
**Máslýsing**
Í skrivi 08.06.2015 heita borgarar í Saltnesi á kommununa um, at fáa gjørt okkurt við frárenningina frá rørinum, sum liggur undir omankoyringini til sethús teirra, og við veitina har vatnið rennur í.

Fyrst í 80'unum gjørdi Nes kommuna nýggja omankoyring til sethúsini teirra av tí, at koyrivegurin var hækkaður so nógv, at verandi omankoyring ikki kundi nýtast.

**Tilmæli**
Á fundi 09.06.2015 mælir Tekniska nevnd til, at rørið verður longt, og lagt niður í lendið, og veitin verður reinsað.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 51/2015 Byggimál**
J.nr. 2014-0041-0016
**Málslýsing**
Borgarstjórin og vinnunevndin hava seinastu 2 árini havt fundir og samskift við Bústaðir við tí endamáli at fáa Bústaðir at byggja leiguíbúðir í Nes kommunu.

Upprunaliga var ætlanin at fáa Bústaðir at byggja á Lýðarsvegi. Byggifelagið KBH gjørdi skitsuprojekt og kostnaðarmeting av hesi bygging.

Bústaðir hevur ongantíð dult fyri, at teir høvdu dámt betur, um staðsetingin var longri niðri í bygdini, og fyrr í vár komu so endaligu boðini, at teir ikki vildu byggja á Lýðarsvegi.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 22.06.2015*

Borgarstjórin og vinnunevndin hava síðani havt fundir og samskift við Bústaðir um støðuna. Bústaðir hava nú boðað frá, at teir eru sinnaðir at byggja á Kneysum - á økinum norðan fyri eldrasambýlið Vesturskin.

Vinnunevndin er samd um, hóast staðsetingin er broytt og møguliga fer at hava beinleiðis útreiðslur fyri kommununa í fyrstu syftu, at hetta er eitt gott átak og fer at geva fleiri framtíðarmøguleikar í Nes kommunu.

**Tilmæli**

Vinnunevndin mælir til:

1. at Vinnunevndini fær heimild at arbeiða víðari við hesi ætlan saman við Bústaðir.
2. at Vinnunevndin eftir summarfrítíðina - ella so skjótt sum møguligt - leggur uppskot fram um, hvussu ætlanin kann fremjast – herundir fíggjarliga partin hjá Nes kommunu.

**Avgerð**

Tilmælið frá Vinnunevndini var einmælt samtykt.